# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Varð Føroya Banki seldur ov bíliga?

Í dag upprann so tann dagur, at Føroya Banki varð skrásettur á virðisbrævamarknaðinum - og beinanvegin kundu íleggjarar fagnast, tá kursurin fór 20-25% upp beinanvegin.

Tann ovurstóri áhugin at keypa gevur eina sera týðuliga ábending um, at fólksins ogn í hesum føri varð seld ov bíliga. Vinnararnir eru sjálvandi tey mongu, sum hava keypt partabrøv. Men einamest tey í størra bólkini - ríkaru og stóru íleggjararnir.

Taparin er Landskassin - tú og eg. Fyrstu partabrævahandlarnir vísa, at sølukursurin á 189 DKK helst hevur verið ov lágt settur. Og er munurin veruliga so stórur 20-25%, er talan um fjórðings milliard sum er latin íleggjarum fram um landskassan.

Vit skulu sjálvandi hava í huga, kurssveiggini kunnu vera ónormal fyrstu tíðina, eitt partabræv er á marknaðinum, og tí nýtist munurin ikki varandi at verða so stórur. Men hetta er í øllum førum bensin á bálið hjá teimum kritisku røddunum, sum støðugt hava ført fram, at bankin - fólksins ogn - verður avreidd alt ov bíliga.

Komandi dagarnir fara at vísa, hvussu leikur fer.

**Sosialurin**

## Ognartøka, eykaskattur ella bæði?

**JENIS AV RANA**



Til fyri fáum døgum síðani áttu tú og eg 1/ 48.000 part av einum banka, ein ogn, ið eg loyvi mær at virðismeta til umleið kr. 60.000. Tað merkir so aftur, at eitt húski við móður, faðir og 3 børnum átti eitt virði svarandi til kr. 300.000.

Men brádliga ein morgun í farnu viku vórðu 2/3 av hesum virði ognartiknir, grundað á eina nærum einmælta løgtingssamtykt í fjør vár, sum heimilaði hesum.

2/3 av 60.000 - tvs. kr. 40.000 (ella fyri familjuna oman fyri kr. 200.000) vórðu við hesari løgtingssamtykt ognartiknar frá tær og mær. Ella vit kunu eisini siga, at við hesum varð ein eykaskattur av ókendum dimensiónum frá degi til dag lagdur á hvønn einasta føroying, frá elsta til seinast fødda pinkubarnið.

Jamen, tað almenna dugir jú ikki at reka bankar, hevur onkur kanska lært teg at svara mær, so var ikki upp á tíðina at selja hann?

Hesum uppáhaldi eri eg als ikki samdur í, men um so var, hví so ikki, ístaðin fyri at skipa eina sølu, ið gevur nøkrum fáum møguleika at ríka seg av ogn alra, geva hvørjum einstøkum føroyingi (bankaánara) sín part av bankanum sum partabræv? So kundi hann, hon ella tey gjørt av, um tey framvegis vildu eiga part av bankanum ella at umseta hesa ogn til krónur og oyru - og tá væl at merkja til fult søluvirði?

Saman við bankanum áttu tú og eg fornemmar ognir - málningalist fyri óivað trísiffrað milliona krónutal. Løgtingið viðgjørdi hetta áðrenn heimferð í vár, og lovað varð, at hesar ognir skuldu ikki seljast við bankanum, men framvegis vera ogn vanliga føroyinga.

Men longu dagin eftir at sølan var byrjað, trein embætismaður, høgra hond landstýrismansins í skúla- og mentamálum, fram, og kunngjørdi, at hesar ognir skuldu keypast frá bankanum. Vit, tú og eg, skuldu keypa tær frá privatiseraða bankanum, tí ”nú hevði sølan jú givið so nógv av sær til landskassan”. Tvs. at man ognartekur ogn tína, áleggur eykaskatt og síðani brúkar man skattapening tín at keypa, tína vegna, frá nýggju eigarunum tað, ið tú og eg frammanundan áttu.

Omaná alt pástendur man, at útlendskir serfrøðingar hava lagt hetta til rættis, og tað sambært bestu og fremstu serfrøði.

Frá mínum sjónarhorni er als ikki talan um serfrøði ella vísund, tíansheldur um vit ella skil. Haldi heldur talan vera um miðvíst tilrættalagda ognartøku, umfordeiling av ríkidømi og eykaskatt.

## Ungdómar sjálvandi útbúgvast innan donsku sjóverjuna

**KAJ LEO JOHANNESEN**
Sambandsflokkurin



Tað kemur ikki uppá tal at taka møguleikan frá 529 føroyskum ungdómum innan ríkisfelagsskapin.

Um ungir føroyingar ynskja at gera brúk av sínum persónliga frælsi og taka eina útbúgving innan donsku sjóverjuna, so skulu tey hava loyvi til tað, uttan at politikarar gera sær dælt av at undirgrava møguleikarnar í ríkisfelagsskapinum.

Nógvir føroyingar hava higartil tikið av møguleikanum at virka innan donsku sjóverjuna, og er hetta eitt gott høvi hjá ungum evnaríkum fólkum, um tey vilja læra nakað nýtt og gevandi.

**Metstórur áhugi**

At áhugin er ovurhonds stórur, sæst á svarinum, sum Søren Gade, verjumálaráðharri, gav Høgna Hoydal í sambandi við fyrispurning á fólkatingi.

Í svarinum sigur Søren Gade, at ikki færri enn 529 ungir føroyingar vóru um borð á Hvidbjørnen, tá danska verjan kunnaði um útbúgvingarnar í verjuni um mánaðaskiftið maijuni. Ung millum 16 og 25 ár vórðu boðin um borð á Hvidbjørnen, meðan skipið lá í Havn, Klaksvík, Runavík og á Tvøroyri.

Høgni Hoydal, sum í sínum ungu døgum tók av møguleikanum at vera dekkari umborð á sjóverjuskipinum, Ólavi Halga, bað verjumálaráðharran steðga framferðini hjá donsku verjuni í Føroyum, sum roynir at fáa føroysk ungfólk umborð á sjóverjuskipini.

Men ríkisstjórnin heldur tað vera ein fyrimun, ”at værnepligtige og ansatte i forsvaret afspejler sammensætningen i samfundet som helhed”, sum Søren Gade sigur í svarinum til Høgna Hoydal. Tí er tað eisini ein fyrimunur, at ungir føroyingar eru partur av sjóverjuni.

Tekur “tjóðveldis-frælsi” fram um persónligt frælsi

Tað er rættiliga ófatiligt, at onkur politikari ikki vil lata okkara ungdóm sjálvan taka avgerðina, um annahvørt at taka av møguleikanum at virka innan donsku sjóverjuna, ella at lata vera.

Hetta er ein útbúgvingarmøguleiki á sama hátt sum aðrar útbúgvingar, har tú kanst menna tínar førleikar, og fyri stóran part av okkara ungdómi er hetta ein spennandi avbjóðing, sum gevur góðar møguleikar seinni í lívinum.

So at biðja danir um at lata vera við hesum átøkum, er beinleiðis at skerja tað persónliga frælsið hjá tí einstaka at virka fult í ríkisfelagsskapinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.